Slapp eg inn ?

Hvørt ár er søgan tann sama. Postboðini bera brøvini frá »Den Koordinerede Tilmelding« út um ólavsøkuna, vónríkir umsøkjarar lata tey upp, og har endar felags søgugongdin hjá teimum, sum hava søkt um upptøku á hægri útbúgvingarstovnum í Danmark. Fyri summi er ólavsøkan so at siga oyðiløgd, meðan onnur beinanvegin byrja at pakka

UMSÓKNARSVAR
Rúnar Reistrup

Um brævbjálvin er tunnur er tað eitt nei, men er brævbjálvin tjúkkur er tað allarhelst eitt ja. Eitt nei fyllir nevniliga oftast bara eitt ark, meðan tað við einum játtandi svari plaga at fylgja onnur skjøl.

Ein av komandi døgunum, helst mánadagin, fáa hundraðtals føroyingar bræv frá »Den Koordinerede Tildmelding« (KOT) har boðað verður frá, um tey hava fingið pláss á teirri útbúgving, sum tey fyrr í ár vónrík hava søkt um, ella ikki.

Grundreglan um hvussu man sær á brævbjálvanum, um hann inniheldur eitt játtandi ella noktandi svar, fer uttan iva at liggja langt frammi í huganum hjá teimum, sum mánamorgunin fara at telja minuttir til postboðið kemur við brævinum.

Men fyri tey flestu er tað við blandaðum kenslum, at tey lata brævbjálvan upp, tí eitt játtandi svar merkir ikki, at lívið frá nú av verður sól og hunangur. Fyri tey flestu merkir tað samstundis eitt brátt farvæl til familju, vinir og tryggu umstøðurnar heima. Tí skotbráið er stutt og longu um ein mánað skulu tey sita klár í onkrari skúlastovu ella fyrilestrarhøll í Danmark. Og áðrenn tað skulu tey finna sær okkurt stað at búgva og annars renna frá Peri til Pól fyri at fáa alt tað formella viðvíkjandi flytingini í rættlag.

Hjá nøkrum tykist alt hetta so møtumikið og ótrygt, at eitt noktandi svar kann kennast sum ein lætti. Fyri tey flestu er noktandi svarið tó ein tungur biti at svølgja. Men teimum nytist ikki at fella í fátt beinanvegin, tí um skjótt verður farið fram, ber oftast til at koma inn á onkra aðra útbúgving.

Í teimum báðum greinunum niðanfyri verður greitt frá hvat nú er at gera, annaðhvørt tú hevur fingið játtandi ella noktandi svar í brævinum frá KOT.

Um tú fært játtandi svar

Fært tú játtandi svar, merkir tað eisini at tú skalt flyta av landinum, og tá er nógv ymiskt tú skalt minnast til og hugsa um. Her er ein uppskrift uppá at flyta niður at lesa.

JA
Rúnar Reistrup

Hevur tú fingið játtandi svar er góð orsøk til at frøast. Frammanfyri bíðar ein spennandi tíð, sum ikki altíð er so ljósareyð, men har stutt er ímillum avbjóðingarnar. Tær fyrstu standa longu í durinum og tú skalt beinanvegin byrja at fyrireika teg. Á hesum spaltum verður greitt frá nøkrum av tí, sum tú skalt gera komandi mánaðin.

Vátta svarið

Fært tú játtandi svar frá KOT, so er tað fyrsta tú skalt gera at vátta at tú tekur ímóti útbúgvingartilboðnum. Hetta skal gerast skrivliga, og oftast er freistin stutt, so tað skal gerast beinanvegin. Ert tu sloppin inn á dreymaútbúgvingina er lætt at taka hesa avgerð, men ert tú komin inn á eina av teimum lægri prioriteraðu útbúgvingunum, er orsøk til at hugsa seg væl um og kanna eina eyka ferð hvat hendan útbúgvingin í veruleikanum snýr seg um, áðrenn tú sendir váttanina til KOT.

Íbúð

Tú skuldi gjarna havt søkt Kollegiekontórið í býnum, tú ætlar tær til, um íbúð ella kamar fyri minst tveimum mánaðum síðan. Hevur tú ikki tað, so ger tað nú, men vænta ikki at fáa nakað áðrenn tú flytir niður.

Stórt trot er á íbúðum í teimum størru dansku lestrarbýunum, og tí mást tú í fyrstu atløgu taka tað, tú fært. Seinni kanst tú so flyta í okkurt betri. Søk tey kollegiuni, ið hava styttst bíðitíð, um tú ikki hevur nakað stað at búgva, tá tú kemur niður.

At gera í Føroyum

Áðrenn tú stingur í sekkin og fert til Danmarkar, eru nøkur formell og minni formell viðurskifti, tú skalt minnast til at avgreiða.

Tú skalt fara inn á kommunskrivstovuna í tínari kommunu at siga formelt farvæl. Tvs. at tú skalt melda flyting úr kommuni.

Far síðan inn á gólvið hjá Toll- og Skattstovuni. Har skalt tú søkja um at »varveita fulla skattskyldu í Føroyum sum lesandi«. Hetta gevur tær góðar skattaumstøður tá tú kemur heim aftur í feriunum at arbeiða. Ætlar tú tær ikki at arbeiða? Søk kortini – tú kanst ongantíð vita hvussu stórt peningatrotið kann gerast.

Finn útav hvussu tú skalt fáa tíni ting niður. Fylla tey bara ein stóran plastikposa, kanst tú sjálvur bera tey. Fylla tey nakað meir er Postverkið tann frægasta loysnin, men skalt tú hava nógv ting við, so spyr flutnings- og farmafeløgini.

Av teimum minni formellu tingunum, sum skulu gerast áðrenn tú fert avstað, kunnu nevnast at keypa Grønu sangbók og nakrar góðar føroyskar fløgur, fáa email adressurnar hjá øllum teimum, tú kennir, og syrgja fyri at tú eigur nóg mikið av peningi at hava við. Tí tað kostar at flyta, og tað kann ganga lang tíð áðrenn SU setir nakað inn á tína bók.

Komin til Danmarkar

So skjótt tú ert komin til Danmarkar (innan fýra dagar) skalt tú fara inn á kommunuskrivstovuna í tínum nýggja heimbýi og siga formelt halló. Tað inniber at tú meldar teg inn í kommununa og harvið fært eitt »sygesikringsbevis« við einum CPR nummari. Hav altíð tað gula »sygesikringsbevis« uppi á tær, og lær teg beinanvegin CPR nummarið uttanat, tí í Danmark er hetta meira umráðandi enn at tú dugir títt navn. Tú sleppur nærum ikki at keypa eina pylsu uttan at upplýsa »títt nummar«.

Á kommunuskrivstovuni fært tú skjøl, ið skulu brúkast til at velja lækna og tannlækna. Vel onkrar beinanvegin. Tú kanst altíð skifta seinni.

Tá tú hevur fingið títt CPR nummar er tíð at fara í bankan at biðja um eina konto. Far í ein av smærru bankunum, um tú vilt hava góðar umstøður. Størru bankarnir kunnu finna uppá at krevja kontoavrit og lønaruppgerð úr Føroyum og nokta tær Dankort og VISA fyrstu nógvu mánaðirnar.

Við kontonummari og CPR nummari kanst tú nú fara á SU skrivstovuna at útfylla umsóknarblað um útbúgvingarstuðul. Søk eisini um SU lán, um tú hevur brúk fyri tí. Men ansa eftir. Lán skulu gjaldast aftur og mugu tí ikki gerast ov stór.

So hevur tú avgreitt tey "kravdu" viðurskiftini. Men enn er okkurt eftir.

Ætlar tú tær at arbeiða í Danmark, er tað eitt gott hugskot at fara inn á Toll- og Skatt í nýggju kommuni at biðja um Føroyafrádrátt. Serligar reglur eru galdandi um hvør hevur rætt til hendan skattafrádrátt, so kanna um tú hevur rætt til hann, áðrenn tú fert til Toll og Skatt. Ein góður máti at kanna hetta er at ringja til »Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark« (tlf. 31 23 99 80). Hon er har til tað sama.

Tað kann vera eitt gott hugskot at tekna trygging. Ikki minst um tú keypir tær nýggja súkklu, tí tað eru onnur enn tú, sum halda at hon er flott og gjarna vilja eiga hana. Tekna eina »indbo-forsikring«. Hon umfatar eisini súkkluna.

Hevur tú enn ikki funnið nakað at búgva í, so kanst tú fara framvið Kollegiekontórinum í býnum at kæra tína neyð. Tað hjálpir onkuntíð væl.

Fert tú aðrasataðni enn til Keypmannahavnar at lesa, finnast føroyingarfeløg, sum lesandi føroyinar, eins og tú, mynda. Melda teg inn í føroyingafelagið í tínum býi.

Eisini er tað eitt gott hugskot er at tekna seg sum lim í MFS, sum er felag teirra føroysku lesandi. MFS hevur skrivstovur í øllum teimum størru lestrarbýunum í Danmark.

Byrja útbúgvingina

Tá útbúgvingin byrjar fært tú allarhelst eitt størri ella minni kultursjokk. Hini í flokkinum (danirnir) ljóða helst longu sum tey hava gingið har í tvey ár, men tað hava tey ikki, og tey eru líka ósikkur og óvitandi sum tú. Tey duga bara nakað væl betur at tosa og lata sum um tey vita.

Syrg fyri at læra nøkur av teimum at kenna og far við tá tey møtast eftir skúlatíð. Fá vinir á útbúgvingastovninum og far fyri guðs skyld við á »hyttetúrin«, eisini um tú ikki tímir.

Les nógv og møt væl upp, men enda ikki sum turkatræ tó. Hav eitt lív við síðuna av lesnaðinum.

Um tú fært noktandi svar

Hóast tú fært noktandi svar við postinum, so nýtist slagið ikki at vera tapt. Gamaní, tú sleppir neyvan at lesa tað, sum tú ætlaði, men har eru aðrir møguleikar, og kanska ert tú kortini á veg niður at lesa

NEI
Rúnar Reistrup

Tað fyrsta tú skalt gera, um tú fært eitt noktandi svar inn ígjøgnum brævsprekkuna, er at kanna um talan kann vera um ein feil. Hevur tú søkt ígjøgnum kvotu 1 og umsóknin harvið bara verður mett eftir karaktermiðaltalinum, er lætt at kanna um talan er um ein feil. Á internetsíðuni hjá ivuC (www.ivuc.dk) stendur hvat miðaltal tann seinast upptikni umsøkjarin hevði, og er títt miðaltal hægri enn tað, so er møguliga talan um at KOT hevur gjørt ein feil.

Hevur tú søkt ígjøgnum kvotu 2 er eitt sindur verri at síggja, um talan er um ein feil, men um tú heldur tað vera løgið og órímilgt, at tú ikki ert uptikin, so loysir tað seg at ringja til KOT og spyrja.

Fært tú at vita at talan ikki er um nakran feil, men kortini er vísur í tínari søk, ber til at klaga.

Aðrir møguleikar

Verður tú ikki upptikin á ta, ella tær, útbúgvingarnar, sum tú hevur søkt, kanst tú velja at byrja á onkrari aðrari útbúgving. Hetta letur seg gera, tí at tað altíð eru nakrar útbúgvingar, sum hava so fáar umsøkjarar at har er pláss fyri fleiri. Vilt tú hava eitt av hesum plássum ræður um at vera skjótur.

Ring ella skriva beinanvegin til ivuC (tlf. 35 32 29 14) og bið um at fáa listan yvir tær útbúgvingar, sum enn hava pláss fyri fleiri lesandi. Kanna so hvat hetta eru fyri útbúgvingar og um nøkur vekir tín áhuga. Um tú finnur eina, so skriva aftur til ivuC og bið um pláss.

Ljóðar hetta ov møtumikið ber altíð til at venda sær til ráðgevingina hjá LFÚ og heita á tey um at fáa listan yvir leys útbúgvingarpláss til vega frá ivuC.

Tey, sum ikki søktu um upptøku á útbúgvingarstovnum í Danmark áðrenn freistina 1. juli, men nú kortini hava hug at fara niður at lesa, kunnu eisini sleppa inn á hendan hátt.

So fært tú eitt noktandi svar við postinum, ella søkti tú ikki tá tíðin var til tað, hevur tú kortini møguleika at byrja lestur í Danmark 1. september í ár.

Keldur:
Altjóða Skrivstovan
og MFS

Café Natúr um ólavsøkuna

27. juli er opið sum vanligt
frá kl. 09.00 - 01.00

28. & 29. juli er opið frá kl.
11.00 - 04.00

LIVANDI TÓNLEIKUR
26. juli
The Brekkum Brothers
30. juli
góður faríendskur rockur
v/ Petur Kritjánsson Band

CAFÉ NATÚR
Livandi tónleikur — Tlf. 31 26 25

Motiónskappróður

á Strondum leygardagin 25. august
kl. 16.00

Róð verður 1000m
Róð verður við øllum bátastøddum
Vinnandi báturin fær steyp til ognar
og heiðursmerki til nr. 1, 2 & 3

Tú skalt ikki hava róð í ár

Tekning á tlf 216500 ella 447182 í
seinasta lagi 22. august.

Gott hevði verið um sagt var frá
nóg tíðliga

Strálan